

## Taliban stýrir Pakistan

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Hillary Clinton, sigur, at tann pakistanska stjórnin ger, sum Taliban sigur. Tað segði hon undir einari hoyring í Kongressini í Washington. Hillary Clinton segði seg stúra fyri teirri avtaluni, sum tann pakistanska stjórnin hevur gjørt við Taliban, og sum loyvir víðgongdum kreftum at seta islamskar lógir í gildi í einum parti av landinum. Hillary Clinton vísti á, at tær víðgongdu kreftirnar eru bara fáar tímar frá pakistanska høvuðsstaðnum Islamabad, og hon eggjaði pakistanska fólkinum til at forða verandi gongd.

## Uppsagnir hjá Volvo

Svenska bilverksmiðjan Volvo boðaði í gjár frá, at 1.500 starvsfólk í Göteborg Umeå og aðrastaðni í landinum missa arbeiðið, tí bilasølan í Svøríki og uttanlands er minkað. Av teimum 1.500 missa 655 starvsfólk á lastbiladeildini í Göteborg og Umeå arbeiðið. Hini, sum noyðast til hús, arbeiða á deildum í Eskilstuna, Braås, Hallsberg, Skövde Köping og Vara, skrivar TT. Ein talsmaður fyri Volvo sigur, at leiðslan er í samráðingum við fakfeløgini fyri at kanna, um starvsfólk kunnu arbeiða færri tímar, so tað slepst undan einum parti av uppsagnunum.

# Vilja strika lønarhækking hjá arbeiðsfólki

**Í næstu viku skal lønin hjá tímaløntum arbeiðsfólki hækka 2,42 krónur um tíman, men hesa lønarhækkingina vilja arbeiðsgevararnir nú sleppa at strika, hava teir gjørt greitt á fundi við arbeiðarafeløgini fyrr í vikuni**

TÍMALØNIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Arbeiðsgevarar royna nú at fáa fakfeløgini hjá teimum tímaløntu til frásiga sær ein lønarhækking.

Næsta fríggjadag er fyrsti mai, sum eisini er altjóða arbeiðaradagur.

Og eftir sáttmálanum, sum er galdandi ímillum fakfeløgini hjá teimum tímaløntu og arbeiðsgevararnar, skal tímalønin hækka nokk so fitt næsta fríggjadag.

Eftir avtaluni skal tímalønin hækka 2,42 krónur, umframt at eitt prosent skal leggjast oman á eftirlønina afturat.

Men hesa lønarhækkingina vilja arbeiðsgevararnir nú sleppa at strika.

Tað gjørdu arbeiðsgevararnir greitt, tá ið teir fyrr í vikuni kallaðu umboð fyri arbeiðarafeløgini til fundar í Vinnuhúsinum, har teir greiddi frá sínum sjónarmiðum um at strika lønarhækkingina.

Vit hava spurt bæði Ingeborg Vinther, forkvinnu í Føroya Arbeiðarafelag, Hans Joensen, formann í HavnarArbeiðsmannafelag, Vígdis Johannesen, og nógv onnur fakfelagsumboð um fundin, men ongin hevur nakra viðmerking.

Tað einasta, vit fáa at vita, er frá forkvinnuni í Havnar Arbeiðsmannafelag, sum váttar, at fundur hevur verið, men hon vil ikki siga, hvat fundurin var um.

Men frá øðrum fólkum, sum var við á fundinum og sum vilja vera dulnevnd, hava vit fingið váttað, at arbeiðsgevararnir vilja sleppa at strika lønarhækkingina, sum skuldi koma í gildi í næstu viku.

- Uppskotið frá Vinnuhúsinum er, at vit frásiga okkum lønarhækkingina, sum skal koma í gildi næsta fríggjadag. Ístaðin skal hendan lønarhækkingin koma í gildið fyrsta mai 2010, sigur ein av fundarluttakarunum fyri Sosialinum.

Men samstundis vildu arbeiðsgevararnir hava fakfeløgini at lova, at onki skuldi almannakunngerast um fundin.

Annars gongur sáttmálin út tann 30. apríl næsta ár, men Vinnuhúsið bjóðaði samstundis arbeiðarafeløgunum til at leingja sáttmálan í eitt ár til 30. apríl í 2011.

Av tí, at ongin vil siga nakað um fundin, ber heldur ikki til at fáa nakran at siga, hvat tey hava svarað arbeiðsgevarunum.

Men tað skilst, at fakfeløgini skulu geva arbeiðsgevarunum eitt svar ein av fyrstu døgunum.

Og tað skilst eisini á fakfelagsfólki, vit hava tosað við, at fakfeløgini eru alt annað enn sinnað at ganga arbeiðsgevarunum á møti, men ein av fyrstu døgunum fáa arbeiðsgevararnir so eitt formligt aftursvar frá fakfeløgunum.

### Ikki upp á tal

Hóast ongin vil siga nakað nú, kunnu vit minna á, at so seint sum leygardagin staðfesti Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, at tað kemur ikki upp á tal at verkafólkið fer at frásiga sær ætlaðu lønarhækkingina, sum kemur í gildi næsta fríggjadag.

Tað segði hon í sambandi við sjónarmiðið hjá Anfinni Kallsberg, formanni í fíggjarnevndini, sum heldur, at tað einasta rætta er at strika allar lønarhækkingar, bæði hjá tí privata og tí almenna.

Hon staðfesti eisini, at tey tímaløntu hava ikki ráð til at missa lønarhækkingina, tí príshækkingarnar hava verið so stórar, at keypiorkan er lækkað hesi bæði seinastu árini.

Hon legði afturat, at arbeiðarafjøldin hevur sanniliga víst samfelagssinni, tí í heili 10 ár rundan um aldarskiftið, hækkaði tímalønin bara 64 oyru tilsamans og fyri einum fýra ella fimm árum síðani, sleptu tey eisini allari lønarhækking fyri at fáa gongd á eftirlønina.



*Arbeiðsgevarar vilja nú hava fakfeløgini hjá teimum tímaløntu at lønarhækkingiin, sum eftir sáttmálanum skal vera fyrsta mai, verður strikað, tí støðan í vinnuni er so vánalig*

## Flaggdagshald í Fámjin

**Fyrsta føroyska flaggið hongur í kirkjuni í Fámjin og har verður flaggdagshald leygardagin**

Fámjiningar plaga at gera nógv burturúr flaggdagshaldinum. Og tað er kanska ikki so løgið, tí tað var júst tann ungi studenturin úr Fámjin, Jens Olivur Lisberg, sum var við til at sniðgava Merkið og fyrsta eintakið av flagginum hongur enn í kirkjuni í Fámjin.

Eisini á hesum flaggdegnum, leygardagin, 25. apríl, verður flaggdagshald í Fámjin, har Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, fer at halda flaggrøðuna og har Tvøroyrar Hornorkestur fer at spæla.

Haldið byrjar klokkan 15 og tá ið tað er liðugt, eru øll boðin í Vesturhøll, sum er bygdarhúsið í Fámjin, har tey borðreiða við heitum drekka og kringlu.

### Til gongu á flaggdagshald

Í sambandi við flaggdagshaldið, verður eisini skipað fyri gonguferð við ferðaleiðara úr Øravík til Fámjins. Lagt verður til brots við Bønhúsið í Øravík klokkan 13.

Tey gjørdu sama túrin í fjør og tað eydnaðist sera væl við tað, at 70 fólk vóru við og veðrið var gott.

Túrurin tekur einar tveir tímar og ætlanin er at ganga um Valdaskarð. Men tað ber eisini til at renna ella ganga teir 9,4 kilometrarnar eftir vegnum.

Verður runnið róliga, tekur túrurin einar 50 minuttir.

Men tey leggja afturat at fólk við barnavogni klára túrin upp á góðar tveir tímar.

Aftaná flaggdagshaldið í Fámjin koyrir bussur alt gongufólkið aftur til Øravíkar.

## Ongin viðmerking frá arbeiðsgevarum

**- Tað er rætt, at vit hava havt fund við fakfeløgini hjá teimum tímaløntu.**

**Tað váttar Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, tá ið vit biðja hana um eina viðmerking til tað, sum verður ført fram omanfyri um, at arbeiðsgevarar vilja nú hava fakfeløgini hjá teimum tímaløntu at strika lønarhækkingina, sum annars skal koma í gildi fyrsta mai, sum er næsta fríggjadag.**

**Men tað er eisini tað einasta, hon vil siga um fundin.**

**- Vit hava tosað við arbeiðarafeløgini, men hvat vit hava tosað við um, vil eg ikki gera viðmerkingar til, sigur hon.**

## Nágreining: Bjørt Samuelsen og Johan Dahl ikki dripið Atlantsflog

Í Sosialinum í gjár høvdu vit eina grein um Atlantsflog, har Eyðfinn Jacobsen greiddi frá, hví hann hevur sagt seg frá sum næstformaður í felagnum.

Inni í blaðnum var yvirskriftin til greinina: Bjørt Samuelsen og Johan Dahl skaða Atlantsflog illa.

Á forsíðuni varð hetta spískað til at Bjørt Samuelsen og Johan Dahl hava dripið Atlantsflog.

Hóast tað at drepa í hesum føri sjálvandi er myndaligt, var hetta at taka ov rívan til. Fyri at sleppa undan misskiljingum skal nágreinast, at grundarlag er bara fyri yvirskriftini inni í blaðnum, tí tað, fyrrverandi næstformaðurin sigur, er at bara tíðin fer at vísa, hvussu stóran skaða, hendan politiska uppíleggingin (hjá Bjørt Samuelsen og Johan Dahl, blm.) hevur skatt felagið. Men eftir hansara bestu sannføring, er skaðin rættiliga stórur.